## DAGSINS MEINING

# Sjónvarpsóskil

Tað er eitt sera óheppið samantreff, tá landsstýriskonan í sjónvarpsmálum um somu tíð sum Televarpið leggur til brots, hækkar gjaldið til SVF við 500 kr. Hetta er ein beint frammaná til Televarpið, sum hevur sett sær fyri at víðariføra tað so vælumtóktu Rás Tórshavn. Og bara at langa út við eini so stórari hækking til almenna sjónvarpið uttan at seta hetta í samanhang við gongdina á sjonvarpsøkinum og uttan at stinga út í kortið eina ætlan fyri almenna sjónvarpið virkar frustrerandi og óprofessionelt. Skulu vit hava eitt gott føroyskt sjónvarp, og tað skulu vit, so eigur og skal tað á fíggjarlógina so ella so. Og hetta leiðir okkum so eisini til spurningin, hvat fólk skulu gjalda 2000 kr. fyri. Føroyingar vilja hava føroyskar sendingar. Hesar kosta. Og tann kostnaðurin kann bert fíggjast yvir fíggjarlógina.

Hyggja vit so at skránni, sum Sjónvarp Føroya varpar inn í hvørja stovu, síggja vit, at meginparturin er danskur. Kanska so mikið sum 90%. Onkuntíð meir onkuntíð minni - endursent danskt tilfar. Hetta tilfar er longu frammanundan framleitt og goldið fyri danskar lisenspengar. Skulu føroyskir lummar enn einaferð rinda fyri at sama danska tilfar verður sent út í føroyskt luftrúm, so má talan verða um menningarhjálp. Hjálp frá føroyskum hyggjarum til danskar hyggjarar, so danskar sjónvarpsframleiðslur kunnu verða fíggjaðar tvær ferðir. Kanska kunnu vit halda fram til Svalbard og fáa danskar sendingar trífalt fíggjaðar...nei, vilja vit hava eitt føroyskt sjónvarp, so mugu vit fyrst gera okkum greitt, hvat eitt føroyskt sjónvarp ER og hvussu vit skulu rinda fyri tað og síðani gera tað sum vit megna.

Her mugu myndugleikarnir ikki sleppa undan. Tað kann ikki vera meiningin, at Sjónvarpið sjálvt, ella onkur tilvildarligur persónur, eitt tilvildarligt tíðspunkt, skal siga hvat føroyskt sjónvarp í eitt stokkut tíðarskeið er og skal verða. Her má bæði vitbornin gransking (Fróðskaparsetur), fyrsiting (Mentamálastýrið) og politiska skipanin uppí. Og vónandi eisini eitt komandi brúkarafelag, ið kann taka kvalifiseraða støðu til tilvildarlig útspøl frá tilvildarligum politikarum, so føroyskt sjónvarp ikki verður bukka millum sengur, men far ein forsvarliga loysn. Vit tosa jú um ein almennan lógarásettan miðil, ið eingin eigur at sleppa at skalta og valta við so sum hann vil...Hinvegin kann hetta eisini skjótt blíva ein spurningur, um vit hava ráð til ein "danskan" innfluttan miðil her á landi. Hevði føroyski blaðmarknaðurin orkað at sæð bløð fylt av Jyllandsposten upp til eini 90%? Ella hvussu hevði verið um Útvarpið fór at senda danskar sendingar stórsta partin av degnum? Tað ber jú saktans til. Valið er stjórans. At vit hoyrdu Hjorting ístaðin fyri Elis? Keld Heick fyri Niels Una? Nei, at reka fjølmiðlar, bæði prentaðar og luftbornar, snýr seg um fakligan stoltleika og integritet. Tann viðferð, sum Sjónvarp Føroya hevur fingið í føroysku Tingskipanini og frá teimum, sum vara av, ber ikki boð um hesa áskoðan og kann ikki halda fram. Tað má verða eitt fólkakrav.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Høgni í uppisetri

**Ivaleyst hevði tað verið skilabetri av tær Høgni Hoydal, at tú als ikki gjørdi viðmerkingar til grein mína í Grønlandspostinum, tá tú ert so í uppisetri við argumentum og sakligum atfinningum, sum tú so týðiliga avdúkaði í greinini við skemtiligu yvirskriftini "Vónandi hevur tú etið bláseym, Jóannes." Eftir øllum at døma er tín ráðgeving ikki nóg dygg, og tað at Sjúrður Skaale leyp á bláman, átti ikki at fingið teg at gjørt tað sama.**



**Jóannes Eidesgaard**

Tjóðveldismenn og serliga Høgni Hoydal, Torbjørn Jacobsen og Sjúrður Skaale hava átikið sær uppgávuna at fáa grønlendingar at síggja tað geniala í føroyska fullveldisprosjektinum, sum endaliga leiddi okkum føroyingar inn aftur gomlu heimastýrisleiðina. Og tað er í grundini harmiligt, tí sjálvandi áttu hesar nýggju politisku útgávurnar av Egede heldur at sagt grønlendingum, hvat teir áttu at gjørt øðrvísi, soleiðis at sjálvstýristilgongdin í Grønlandi kom væl frá byrjan.

Men í staðin hava teir brúkt Grønland sum eitt royndarlabaratorium, soleiðis at tað, sum teir ikki megnaðu her heima, tað royna teir so hjá øðrum. Ja, onkuntíð so ágrýtnir, at tað vóru fleiri føroyingar, sum hildu, at føroyska loysingin fór at verða framd í Grønlandi í staðin fyri í Føroyum.

Og nú dittar ein javnaðarmaður sær til at fortelja grønlendingum nakrar veruleikar um føroyska fullveldisskútuna, sum kollsigldi hin várdagin, tá fólkaatkvøðan varð avlýst, tí teir tordu ikki at fáa veruleikan at vita frá veljarunum.

Og líkt er til, at hetta verður næstan fatað sum halgibrot av tjóðveldiselituni, tí teir hava uttan iva hildið seg einsamallan átt grønlendska leikpallin.

**Mangt er í neyðuni nýtt**

Eg hevði hug at taka synd í Høgna, tá eg las hasa greinina, tí eg veit, hann dugur at skriva, um hann hevur okkurt at føra fram. Og hvat er so til ráðar at taka? Jú, hann kryddrar greinina við, at hetta, sum eg hevði skrivað í Grønlandspostinum, tað høvdu hugsjónarmenninir Viðstein, Dammurin og Danbjørg ongantíð gjørt. Og hann tekur hesar skilamenn fram fyri á tann hátt at fáa lesaran at halda, at so man Jóannes Eidesgaard hava gjørt okkurt spinnandi skeivt.

Men her undirmetur tú blaðlesaran, Høgni. Longu aftan á innleiðingina um handan bláseymin, so hevur lesarin sæð, at her er talan um ein politikkara, sum stendur spillnakin. Her eru eingi argumentir ímóti, og her eru ongar sakligar atfinningar.

Og so ger Høgni ta misgerð, sum má sigast at vera ótrúliga ósaklig og ótrúliga ódámlig, at hann letur meg skriva greinina av nýggjum, men nú gjøgnum pennin hjá sær sjálvum. Nú havi eg knappliga sagt, at grønlendingar ikki mugu velja loysingarflokkarnar, eg havi lagt meg út í grønlendska valstríðið, og eg havi sagt, at føroyingar einki nytta.

Og aftur her undirmetur Høgni lesaran. Tað var nevniliga so heppið, at báðar greinarnar - tann, sum eg skrivaði í Grønlandspostinum - og tann hjá Høgna, stóðu lið um lið á somu síðu.

Hvar í gein míni ávari eg ímóti at velja ávísar flokkar? Eg hvørki ávari ella heiti á nakran um at velja nakran flokk, tíansheldur eg nevni grønlendsku flokkarnar. Hvar í grein míni sigi eg, at føroyingar einki nytta? Hvar í greinini leggi eg meg út í grønlendsk viðurskifti? Hvar í grein míni sigi eg, at grønlendingar skulu ræðast frælsið? Hvar í grein míni tosi eg niður til grønlendingar?

Nei, tíverri fyri teg Høgni, eg skrivaði nevniliga ikki ta greinina, sum tú ivaleyst ynskti, eg fór at skriva. Eg kann eisini siga tær so mikið, at eg vigaði míni orð gjølla, og eg hugsaði meg væl um, áðrenn eg skrivaði greinina, tí eg var fullvísur í, at sensururin frá tær og Sjúrða og møguliga øðrum fór at vera náðileysur. Og tí hevði eg hvørki etið bláseym, ella hevði nakar spælt mær eitt puss. Eg hevði stutt sagt hugsað meg væl um, soleiðis at eisini Viðstein, Dammurin og Danbjørg kundu góðtikið tað, eg skrivaði.

**Tá veruleikin gerst ein marra**

Vinaráðini til grønlendingar eru stutt sagt, at teir ikki lata teirra sjálvstýristilgongd fáa eina so vánaliga byrjan sum okkara fekk. At teir ikki gera sjálvstýrispolitikkin til ein eksklusivan politikk fyri tey fáu, men at teir royna at fáa alt fólkið við. At teir byggja henda politikk á breiða semju, sum er einasta trygdin fyri, at verulig úrslit kunnu spyrjast burturúr. Vit endaðu jú i heimastýrislógini.

Lat meg taka eitt brot úr greinini:

"På Færøerne gjorde koalitionen og specielt de to partier Republikanerne og Folkeflokken selvstændighed til en sag for netop deres vælgere og netop deres partier. Man baserede politikken på det smallest mulige flertal i Lagtinget. Man glemte simpelthen at tage hensyn til, at andre borgere på Færøerne og andre partier på Færøerne måske havde en anden opfattelse, selv om man samtidig kunne konstatere, at samtlige partier var indstillet på at opnå større selvstændighed. Kon-sensus lå lige om hjørnet. Men desværre viste landsstyret i bund og grund en meget ringe forståelse for demokratiets fundamentale værdier."

Men uttan iva hevur tykkara boðskapur í Grønlandi verið ein annar, enn tann veruleiki, sum eg havi dittað mær fram við.

Eg spurdi forrestin eisini í greinini, hvat orsøkin var til, at Sambandsflokkurin var størsti flokkur í Føroyum? Var tað kanska, tí at fullveldismálið var ein succes? Ella var tað tí, at man hevði lopið óneyðuga øði í millum vejararnar? Svarið kennur tú Høgni.

At tú so ikki vilt viðurkenna egna ómegd, tað er so bara harmiligt. Men tað gevur tær tó ikki rætt til at uppfinna ein nýggjan veruleika.

Veruleikin er veruleikin, sjálvt tá hann er ein marra.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til forsíðugrein í Dimmalætting hósdagin

**Mikkjal Helmsdal**
*sjónvarpsstjóri*



"Sjónvarpsgjald skapar ónøgd - eisini í sjónvarpinum". Hendan yvirskriftin koma at standa yvir forsíðugrein í Dimmalætting, ið varð bygd á viðtal millum meg og blaðkvinnuna Sonju Jógvansdóttir. Tað var ein rímiliga lang samrøða, og eg má hava úttrykt meg heldur fleirtðýðugt at døma eftir teirri niðurstøðu, sum verður løgd mær í munnin. At sjónvarpið sum stovnur er ónøgt við hækkingina av hyggjaragjaldinum, havi eg ikki sagt. Sjónvarpinum tørvar peningin og fer ikki at vísa hann frá sær. Men tað er eingin loyna, at hendan politiska loysnin av málinum, skapar misnøgd millum fólk og leggur stórt trðýst á stovnin. Hetta hava vit longu merkt í blaðleiðarum, lesarabrøvum og á trðýstinum á telefonir stovnsins.

Greinin gevur ta fatan, at Sjónvarp Føroya tekur avstand frá hækkingini, og at landsstðýrismaðurin hevur handlað heilt uttan samráð við sjónvarpið. Hetta er ikki rætt. Blaðkvinnan spurdi, um SvF hevði søkt um at fáa sjónvarpsgjaldið hækkað við 500 kr. Til hetta var svarið nei, tí SvF hevur ikki sent inn nakra beinleiðis umsókn um hækking av sjónvarpsgjaldinum.

Men tá tað er sagt, vil eg leggja fylgjandi afturat viðvíkjandi gongdini í málinum:

Tá Sjónvarp Føroya lat inn rakstrarætlan sína í sambandi við fíggjarlógina 2003, søkti stovnurin um at fáa eina rakstrarjáttan upp á 5 mill. krónur og eina játtan til loypandi tøkniíløgur upp á 3,5 mill. krónur. Gjørt varð vart við, at stovninum tørvar umleið umleið 3 mill. krónur afturat verandi inntøkum í 2003 fyri at halda somu framleiðslu sum í 2002. Stovnurin hevur, sum er, onga rakstrarjáttan á fíggjarlógini, men fíggjar virksemið við hyggjaragjaldi, lýsingarinntøkum og eydnuspæli.

Í august fór Annlis Bjarkhamar mentamálaráðharri undir at arbeiða við málinum um fígging av virkseminum hjá Sjónvarpi Føroya. Í tí sambandi legði undirritaði sum sjónvarpsstjóri fram eina langtíðarætlan fyri, hvussu virksemi sjónvarpsins kundi verið útbygt yvir eitt 4 ára skeið, soleiðis at tað í framtíðini kundi gerast eitt veruligt meginsjónvarp. Ætlanirnar at fáa eina breiða politiska semju um eina langtíðarmenning av sjónvarpinum vóru kortini lagdar til viks eftir nakrar vikur.

Tíðliga í oktober skrivaði sjónvarpið til Mentamálaráðið og gjørdi vart við, at varð einki gjørt fyri at bøta um fíggjarligu viðurskiftini hjá stovninum í 2003 fór at verða neyðugt at siga upp minst einum fimtingi av starvsfólkinum og at skera framleiðsluna niður við 30-50%. Í hesum brævi vísti SvF á, at Mentamálaráðið hevði møguleika til, sum ein seinasta útveg, at útvega stovninum pening við at hækka hyggjaragjaldið. Tal var tó ikki sett á hesa hækking frá sjónvarpsins síðu.

Mentamálaráðið arbeiddi tá við einum uppskoti um kringvarpsgjald, sum varð lagt fram fyri politisku flokkarnar miðskeiðis í oktober. Hetta uppskot vildi givið sjónvarpinum nakrar milliónir afturat árliga at arbeiða við, men vann tó ikki politiskan frama. Sum eina aðru strategi royndi Mentamálaráðið síðani at fáa politiska undirtøku fyri at taka av MVG'ið fyri sjónvarps- og útvarpsgjaldið. Hetta skuldi eftir ætlan geva SvF umleið 5 mill. kr. Heldur ikki hetta vann politiskan frama.

Eftir hetta valdi mentamálaráðharrin, sum í øllum málinum hevur havt forstáilsi fyri torføru fíggjarligu støðuni hjá sjónvarpinum og sýnt vilja til at finna eina loysn so at sleppast kundi undan einum fíggjarligum skrædli, at hækka sjónvarpsgjaldið við 500 kr. SvF varð kunnað um ætlaðu hækkingina frammanundan, og hevur ikki mælt frá henni. Sjónvarp Føroya kundi sjálvandi havt ynskt sær, at onnur av teimum fyrru loysnunum, sum vóru politiskt frammi, høvdu komið ígøgnum. Tað hevði verið lættari -og hugaligari- at farið undir tær ábøtur av tænastum sjónvarpsins, ið sjálvandi skulu fylgja við eini hækking av inntøkunum, uttan ta flóðalduna av misnøgd og ábreiðslum, sum hevur skolað inn yvir stovnin frá illum hyggjarum seinastu dagarnar. Men vit eru ikki ónøgd. Tað kundi verið so nógv verri.

Vóru ikki fingnar stovninum hækkaðar inntøkur so ella so í 2003, hevði niðurskurðurin av bæði starvsfólkahópinum og virkseminum verið so ógvusligur, at rættast hevði verið at tikið málið upp, hvørt tað yvirhøvur gevur eina meining framhaldandi at hava eitt alment føroyskt sjónvarp.

Hvørki eg ella nakar annar í Sjónvarpi Føroya fara tí at brigsla mentamálaráðharranum, at hon hevur nðýtt einasta útveg, ið hon hevði eftir, at tryggja at stovnurin ikki legst í sor komandi ár.

Hækkingin í hyggjaragjaldinum fer lutvíst til at fylla tey hol, sum útlit eru til í rakstrinum fyri 2003. Men vit á stovninum vilja gera alt fyri, at so nógv sum gjørligt fer at síggjast aftur í fleiri, betri og fjølbroyttari føroyskum sendingum.

# Góðu býráðslimir, so hendi tað

**Jóhan á Plógv**
*á Heygnum Mikla 1, Tórshavn*

Mikukvøldið 3. desember kl 17.00 hendi tann fyrsta skutaraólukkan á Heygsvegnum, Tórshavn. Hesin vegurin sum blívur brúktur sum rasarabani, bæði av bilum, skutarum og motorcrosssúklum, má fyrr ella seinni blíva eitt ólukkustað. Ólukkan sá ræðulig út, og vónandi fær hesin ungi drongurin ikki varandi mein, og heldur ikki tann unga gentan sum koyrdi bilin.

Um summarið verður Heygsvegurin brúktur sum rasarabani av knallertum, ikki bara um kvøldið, men eisini langt út á morgni til kl 05.00. Eg síggi henda ungdómin pimpa undir lyktapelunum, eg skal ikki siga, at teir sum koyra pimpa, men teir eru í hvussu so er uppøstir av onkrum, tí teir koyra sum svakir aftur og fram við ávirkaðum fólki aftanfyri. Av tí at eg veit hetta kemst av, at sovikamari hjá mær vendir út ímóti vegnum, og um summarið fái eg ikki sovið vegna henda larm.

Tað er ikki bara tí at eg ongan náttarfrið fái, at eg skrivi hesi orð, men eisini fyri at fyribyrgja, at tað sum hendi 3. desember ikki skal henda aftur; og tað at eg havi børn, sum lættuliga kunnu enda undir einum bili ella knallert.

Mín áheitan til býráði er tann um at koyra »bump« ella okkurt annað á vegin sum ger, at bilar og knallertir ikki koyra ov skjótt eftir Heygsvegnum. Eisini skal sigast, at ljósið fram við vegnum ikki er sera »lýsandi«.

Eg veit eisini av royndum, at »bump« og aðrar forðingar ikki koma fyrr enn mannalív eru kravd. Vónandi verður Heygsvegurin undantakið.

---

†

Tað verður kunngjørt fyri ætt, vinum og kenningum at okkara elskaði sonur, beiggi, svágur, mammubeiggi og pápabeiggi

**Karl Hansen**
Glyvrar

andaðist í Grindavík í Íslandi 3. desember, 35 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinri.

**Hanni, Inga, Katrin, Niels Pauli við familju**

---

# Tjóðveldiskafé í Klaksvík

**Fríggjakvøldið skipar unga Tjóðveldi í Norðoyggjum fyri einum kafé-kvøldi í Klaksvík. Formaðurin í felagnum Gunhild Dahl Niclasen sigur, at felagið bleiv stovnað fyri stuttum og nú fara tey at royna at fáa limir og vekja áhuga millum ung**

KAFÉ-KVØLD
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Felagið unga Tjóðveldið í Norðoyggjum bleiv sett á stovn fyrr í ár, men ikki hevur verið nógv at hoyrt til tey. Men nú hava tey ætlanir um at skipa fyri ymiskum tiltøkum, sum skulu verða við til at gera felagið sjónligari. Og tey byrja við at skipa fyri einum kafé kvøldi fríggjakvøldið. Kafé kvøldið verður í hølunum hjá Klaksvíkar Bridgefelag á Biskopstø.

Gunhild sigur, at tá ber eisini til at tekna seg sum lim, men hon leggur eina við, at øll eru hjartaliga vælkomin á gátt. Hon heldur, at fríggjakvøldið er eitt gott høvi til at leggja út við eini kafé, tí tá er Open by Night í Klaksvík, og tað merkir, at handlarnir hava opið til klokkan 23. Og verður veðrið gott, so kann tað væntast, at mong fara at nýta høvi til at keypa jólagávur. Og tá kann tað verða gott at kunna fara inn og fáa ein heitan kaffimunn.

- Endamálið við hesum er fyrst og fremst at hava eitt hugnaligt kvøld saman, sigur hon og leggur aftur at, at tað ikki bara skal snúgva seg um politikk og fullveldi.

- Vit ætla okkum eisini at hava tað hugnaligt og stuttligt á fullveldisleiðini, og tað kann gerast við millum annað at skipa fyri ymiskum tiltøkum, heldur Gunhild.

Hon heldur eisini, at tað kundi verið ein góður møguleiki fyri at skipa fyri onkrum størri tiltaki, um felagið í Norðoyggjum samstarvaði við felagið í Suðurstreymoy.

Gunhild tók sjálv fyrsta stigið til at seta eitt tílíkt felag á stovn, tí hon helt, at tað var tørvur á tí.

- Tað er onki tílíkt felag í Klaksvík, og so vóru vit fýra, sum settu okkum niður og stovnaðu unga Tjóðveldi við tí fyri eyga at menna tjóðveldisáhugan millum ung í Norðoyggjum, sigur hon og leggur skemtandi afturat, at tað ikki bara eru tey gomlu, sum hava áhuga fyri politikki.

Gunhild Dahl Niclasen sigur, at tey hava gjørt nógv við fyrireikingararbeiðið, og nú meta tey so, at tey eru til reiðar at traðka fram og gera vart við, at tey eru til. Hon greiðir frá, at tey millum annað hava arbeitt við at fáa eina heimasíðu upp á beinini. Eisini hava tey gjørt visitkort og innlimingarseðlar.

Kafé kvøldið hjá unga Tjóðveldinum í Klaksvík verður frá klokkan 19 til 23 fríggjakvøldið.

---

# Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum við gávum, fjarritum, blómum, uppringingum og vitjan gleddu meg á 85 ára føðingardegi mínum 14. november 2002

**Marianna Hjalt,**
**Sandur**